# Skeið í matvørureinføri

***Skeiðið er ætlað øllum ið arbeiða við mati á stovnum, fyritøkum, kantinum o.ø***



*Tíð og stað:* Skeiðið verður mánadagin 3. apríl 2006 frá 9-16 á Húsarhaldsskúla Føroya

*Prísur:* 1200 kr, íroknað mat og tilfar

*Undirvísari:* Johanna á Tjaldrafløtti og Maj Bjerregaard Madsen

**Undirvísingin umfatar:**

**Bakteriur:**
- Tær ið gera gagn
- Tær ið oyðileggja matin
- Tær ið er sjúkuframkallandi
- Hvørjar tær eru og hvar tær finnast
- Hvussu tær liva i mun til viðurskiftir, sum hita/kulda, vætu, ph-virði, ilt og annað
- Kritisk punktir sum heild

**Reinføri í samband við matvørur:**
- Innkeyp av rávørum, móttøka og goymsla.
- Matvøruframleiðsla, (fyrireiking, hitaviðgerðing, niðurkøling)
- Tíð og hiti

**Reinføri í samband við amboð:**
- Dálkan við amboðum
- Krossdálkan v.m.

**Persónligt reinføri:**
- Hendur, kroppur og hár
- prýðislutir og ur
- Arbeiðsbúnin
- Sjúka

**Reingerðing og sóttreinsan**

**Bakteriudyrkan:** Vit hyggja at royndum i eru tiknar av ymiskum amboðum o.l.

Sosialurin 341800

Húsarhaldsskúli Føroya - Stoksoyrarvegur 29 - 700 Klaksvík
Tlf. 456974 - T-postur: hsf@post.olivant.fo

HSF



## YFF - Yrkisfelagið hjá fíggjarstovnum í Føroyum

**Søkir skrivstovufólk til fyrisitingina at byrja 1. mai 2006 ella eftir nærri avtalu.**

**Starvið fevnir m.a. um:**
- vanligt skrivstovuarbeiði, bókhald og roknskap
- sáttmálarøkt & samráðingar
- samskifti við nevnd og limir
- at mynda felagið úteftir

**Umframt viðkomandi útbúgving er tað umráðandi at tú:**
hevur góð samstarvsevnir
kanst arbeiða sjálvstøðugt
ert kreativ/ur og visjoner/ur

Løn og arbeiðstíð eftir nærri avtalu.

**Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:**

**YFF**
J.H. Schrøtersgøta 9
Postsmoga 225
FO-110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 18. apríl 2006.

Hevur tú spurningar til starvið, kanst tú ringja til YFF á tlf 321212 ella 521212.

Sosialurin 341800

**YFF er nýstovnað felag hvørs endamál er at røkja áhugamálini hjá SFS – Starvsfólkafelag Sparikassana og Elektron og YT – Yrkisfelagið Trygdin, ið umboðar starvsfólkini hjá Tryggingarfelagnum Føroyar og Føroya Lívstrygging. Limatalið er í løtuni um tey 400. Skrivstovan er í hølunum hjá Starvsmannafelagnum.**

## STARVSFÓLK SØKIST TIL SØLUDEILD OKKARA

Starvið umfatar sølu av øllum tí, ein el-innleggjari hevur tørv á.

Tað er neyðugt at hava útbúgving sum elektrikari. Kunnleiki innan handil er ein fyrimunur.

Dentur verður lagdur á, at tú dugir væl at samskifta.

Afturfyri bjóða vit, at tú fært eitt spennandi starv

Umsókn verður at senda til:

solar FØROYAR

Brekkutún 2 · Hoyvík · Postsmoga 105 · Att.: Finn Jørgensen
Tel 35 79 33 · solar@solar.fo

# Lærari til Hoyvíkar skúla

Søkt verður eftir vikari fyri lærara í barnsburðarfarloyvi frá 1. mai og restina av skúlaárinum. Starvið er 20 undirvísingartímar á 5. árgangi í føroyskum, donskum, enskum, kristni, søgu og ítrótti. Lærarin er flokslærari og arbeiðir í samstarvi við 5. floks toymið.

Lønt verður eftir sáttmála við fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving og royndum skulu sendast til:

**Hoyvíkar Skúla**
Postrúm 3073
110-Tórshavn

áðrenn 18. apríl.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlastjóran á tlf 302590 ella 227603.

Hoyvíkar Skúli

**Birgit Arge**
Skúlastjóri
Hoyvíkar Skúli

*Í Hoyvíkar Skúla ganga 454 næmingar. 37 lærarar starvast í skúlanum.*

PM P/f POUL MICHELSEN

## Goymslufólk søkist

Á seinnapartsvakt okkara er eitt starv leyst at søkja hjá einum røskum, álítandi og fyrikomandi fólki.

Arbeiðið umfatar avgreiðslu av ordrum, útkoyring og annað goymsluarbeiði.

Vaktin er frá mánadegi til hósdag frá kl 14. til umleið kl. 23-24

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur stóra koyrikortið.

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum/prógvum skal sendast til:

**P/f Poul Michelsen**
Postrúm 200
FO-110 Tórshavn.

Um spurningar eru um starvið, ber til at ringja til Bjarna Arnason, goymslustjóra, á 59 46 91.

**P/f Poul Michelsen**

*P/f Poul Michelsen ella bara PM, sum heilsølan ofta verður nevnd millum manna, varð stovnað í 1974. PM er í dag førandi heilsøla innan sítt virkisøki og hevur kundar kring alt landið. Virksemið er í støðugum vøkstri, og tí verða vørumóttøku og - útkoyringsparturin og goymslan sjálv bygd út í løtuni. PM er skipað í 5 deildir: Sølu-, innkeyps-, fíggjar-, goymslu- og útkoyringsdeild. Á goymsluni og í útkoyringini starvast íalt 15 fólk. Hjá PM starvast íalt 50 fólk.*

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo